Norðoyatunnilin p/f
Skansavegur 7
Postboks 1010
FO-110 Tórshavn

Tel +298 350200
Fax +298 350201

# Frágreiðing
# til aðalfundin 21. juni 2006
**(fyri árið 2005)**

Til ársaðalfundin tann 21. juni 2006, er fylgjandi greitt:
- tunnilin varð latin upp fyri ferðslu 29. apr 2006, uml. 3 mánaðar fyrr enn ásett í tíðarætlanini
- tá ið tunnilin varð latin upp fyri ferðslu, vóru bert smávegis manglar
- ferðslan í tunlinum var fyrstu vikuna, meðan frítt var at koyra, uml 5600 akfør/dag og hevur í mai mánaða annars verið úr 1500 upp í 2000 akfør/dag
- samlaða íløgan er mett til uml 405 mió kr, ið samsvarar við fíggjarætlanina
- nýtslugjaldið er fyribils sett at vera tað sama sum í Vágatunlinum.

**1. Nevndin og felagið**
Nevndin hevur í 2005 havt 9 fundir og 4 fundir higartil í ár.

Nevndin hevur síðani apríl 1999 havt 5 limir. Á seinasta aðalfundi fór Oyvindur Brimnes úr nevndini og Jóhanna á Bergi var nývald í nevndina. Hinir nevndarlimirnir vórðu afturvaldir og nevndin skipaði seg við Bergi í Garði sum formanni og Jens Kára Vilhelm sum næstformanni. Hinir nevndarlimirnir eru Heri M. Hammer og Bjarni A. Bjarnason.

Einans nevnd og stjóri eru sett í felagnum. Øll onnur starvsfólk verða nýtt í samstarvi við Vágatunnilin p/f.

Felagið hevur felags skrivstovu við Vágatunnilin p/f á Skansavegi 7. Felags virksemi hjá báðum feløgunum verður samskipað á felags nevndarfundum við p/f Vágatunnilin, og verða avgerðir av felags týdningi tiknar upp á hesum fundum.

Partapeningurin var seinast hækkaður á eykaaðalfundi tann 16. mars 2006 við 32,5 mió kr, soleiðis at samlaði partapeningurin nú er 127,5 mió kr.

**2. Virksemi**
Felagið hevur í 2005 hildið fram við undirsjóartunnilsgerð millum Eysturoynna og Borðoynna. Tunnilin varð skotin ígjøgnum 25. juni 2005 og síðani hevur verið arbeitt við at gera tunnilin lidnan.

**-Tunnilsarbeiðið**
Arbeiðið uppá tunnilin byrjaði í Leirvík tann 18. dec 2003, tá ið fyrsta skotið var latið av. Arbeiðið uppá tunnilin byrjaði í Klaksvík 20. apríl 2004, tá ið fyrsta skotið var latið av har. Við árslok 2005 vóru sprongdir 2260 m av tunli frá Leirvík og 1528 m frá Klaksvík.

25. juni 2005 varð tunnilin skotin ígjøgnum. Hetta varð hátíðarhildið við samkomu í tunlinum og við borðhaldi um kvøldið fyri gestum, m.a. umboð fyri arbeiðstakararnar, landsstýrið, løgting, kommunur og onnur.

Felagið legði frá byrjan dent á, at Norðoyatunnilin skuldi vera so liðugur sum til bar, áðrenn hann var latin upp fyri ferðslu; arbeiðið hevur gingist væl, soleiðis at tað kortini bar til at lata tunnilin upp 3 mánaðar áðrenn ásett varð í sáttmálanum. Eftir eru at gera ábøtur á manglarnar, ið staðfestir vóru við avhendingina, og er freistin fyri hesum arbeiðum sett til juni 2006.

Brunaumsjónin setti 11. juli 2005 fram kravboð um, at ávíst bjálvingarevni ikki mátti nýtast í tunlinum og kærdi felagið hesa avgerð í skrivi 13. juli 2005. Brunaumsjón landsins og P/F Norðoyatunnilin viðgjørdu saman við Fiskimálaráðnum ósemjuna. Víst varð til arbeiðið, ið gjørt varð við at finna annað egnað tilfar at tekja tunnilin við, og fekst semja um:

1) *at* tað ikki slepst heilt undan at nýta PE máttur,
2) *at* nýtslan av PE máttum skal avmarkast í størst møguligan mun,
3) *at* neyðug stig verða tikin til tess at tryggja, at har PE máttur verða nýttar, skal betonglag undir neyvum eftirliti verða lagt uttaná í fyriskrivaðari tjúkd.

Partarnir vóru somuleiðis samdir um, at P/F Norðoyatunnilin, har tað letur seg gera, skuldi viðgera tunnilin við øðrum bjálvingarevni, sum verður sprænt uppá.

Vísandi til hesa semju tók Brunaumsjón landsins 12. sep 2005 kravboðini aftur og Norðoyatunnilin tók aftur kæruna. Felagstíðindaskriv um hetta varð sent 12. sep 2005.

**- Vegarbeiðið**
Atkomuvegirnir til tunnilin eru lidnir samsvarandi verklagslógini og er ferðslan fyribils beind gjøgnum Leirvíkar bygd.

**- Fígging**
Íleggingargrunnurin fyri Føroyar veitir fígging í byggitíðini og endaliga fígging tá ið tunnilin verður tikin í nýtslu. Byggifíggingin er stór 270 mió kr og endalig fígging er játtað stór 170 mió kr. Arbeitt verður við at fáa lendið við tunnilsmunnarnar matrikulerað, soleiðis at pant fyri endaligu fíggingini kann tinglesast.

**- Nýtslugjald, ferðsla og gjaldstøð**
Nýtslugjaldið er fyribils ásett at vera tað sama sum í Vágatunlinum. Ferðslan hevur síðani upplatingardagin verið úr 1500 upp í 2000 akfør/dag. Ætlaði umsetningurin uppá 30 mió/ár, byggir á at meðalferðslan verður 1500 akfør/dag, tó við atliti til hvussu ferðslan býtir seg millum ymsu sløgini av haldi v.m.

Gjaldstøðin í Norðoyatunlinum er, eins og nýggja skipanin í Vágatunlinum, sett upp inni í sjálvum tunlinum, við tað at hetta verður mett at geva rakstraligar fyrimunir, eitt nú við atliti til kava, vánaligt sýni og ávirkan frá veðri og vindi. Avtalað varð við Vágatunnilin, at tað felagið skuldi standa fyri dagføring og víðking av verandi innkrevjingarskipan, soleiðis at hon kann taka sær av viðskiftafólki hjá báðum feløgunum og so hon gagnnýtir teir nýggju tøkniligu møguleikar, ið eru á samskiftisøkinum. Skipanin stýrir viðskiftafólkunum og skrásetir ferðsluna, soleiðis at klárt mark er millum fíggjarligu viðurskiftini hjá báðum feløgunum.

**- Heilsa, trygd og umhvørvi**
Tunnilsarbeiðstakarin hevur gjørt tilbúgvingarætlan fyri tunnilin í gerð, og er hendan umrødd saman við avvarðandi myndugleikum. Trygdararbeiðið hevur eydnast væl og fegnast vit um, at tunnilsarbeiðstakarin hevur megnað at framt arbeiðið uttan stórvegis óhapp. Eitt bonus varð avtalað í sáttmálanum fyri trygdararbeiði, og fær arbeiðstakarin hetta útgoldið.

Tilbúgvingarætlan fyri tunnilin í nýtslu er gjørd og sett í verk av pørtunum. Ætlaða stórvenjingin, sum skuldi vera í apríl 2006, varð vegna verkfall útsett til september 2006.

Avtalur eru gjørdar við Leirvíkar kommunu og Klaksvíkar kommunu um at felagið rindar part av útgerð sum tørvur er á, fyri at hava nøktandi tilbúgving ísv. tunnilin.

Vitandi at Norðoyatunnilin elvir til økta ferðslu, og at tey ungu eru í vandabólki, nýtti felagið høvið í sambandi við at tunnilin varð latin upp fyri ferðslu, til at lata 200.000 kr til Ráðið fyri Ferðslutrygd, ið er ætlað til at stuðla arbeiðið teirra fyri ferðslutrygd serliga millum ung.

**- Hátíðarhald**
Í sambandi við at tunnilin varð latin upp fyri ferðslu, var hátíðarhald 29. apr 2006.

Dúgvan sigldi seinasta túrin av Leirvík við gestum og ferðafólki. Á ferjuleguni í Klaksvík varð Dúgvan móttikin av stórari mannfjøld, har Jacob Vestergaard, landstýrismaður í innlendismálum og Kristian Davidsen, strandferðslustjóri, hildu røðu fyri manningini á rutuni, sum nú er niðurløgd. Av ferjuleguni koyrdu ellisakfør við innbodnum gestum, eins og skrúðgonga við hornorkestrinum á odda fylgdi eftir, út til tunnilsmunna á Borðoyarvík har sjálvt hátíðarhaldið fór fram.

Undir hátíðarhaldinum við tunnilsmunnan framførdi hornorkestur úr Klaksvík og serligt tunnilskór. Dávid Reinert Hansen, stjóri í felagnum bjóðaði vælkomin. Røður vóru frambornar av Jóannes Eidesgaard, løgmanni, Bjarni Djurholm, landstýrismanni, Steinbjørn O. Jacobsen borgarstjóra og Bergur í Garði, nevndarformanni.

Tá ið Bjarni Djurholm, landstýrismaður hevði skorið snórin um tunnilsmunna av, og tunnilin har við var opin fyri ferðslu, koyrdi bilafylgið av ellisakførum, við løgmanni á odda, gjøgnum tunnilin til bygdarhúsið í Leirvík, har heilsað varð uppá samkomuna, ið har var samankomin. Síðani varð farið aftur til Klingrugarð í Klaksvík, har høgur og lágur var boðin til drekkamunn við tunnilskøku.

Um kvøldið var døgurði fyri innbodnum í høllini eins og Klaksvíkin øll, veitsluskrýdd í góðveðrinum, hátíðarhelt Norðoyartunnilin til langt út á náttina. Á midnátt varð fýrverk, ið Bjargingarfelagið hegnisliga stóð fyri.

Frá felagnum varð dentur lagdur á, at hetta skuldi vera eitt fólksligt hátíðarhald og eydnaðist hetta eftir okkara tykki avbera væl, við góðum samstarvi við Klaksvíkar kommunu.

**3. Mál av samfelags- og samfelagsbúskaparligum týdningi**
Verkætlanin er løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina. Sum ásett í anleggslógini er felagnum játtað tilsamans 235 mió kr til verkætlanina. Verkætlanin er tann størsta á samferðsluøkinum seinastu árini. Lønargjøldini í samlaða arbeiðinum kann metast út frá byggiútreiðslunum og lønarpartinum til einar 45 mió kr um árið í lønum í byggitíðini.

Meginparturin av tilfarinum úr tunlinum er farið til útbyggingar hjá Leirvíkar og Klaksvíkar kommunum, ið harvið fáa munandi nyttu av hesum.

**- Fylgibólkurin**
Fylgibólkurin smb. §7 í anlegslógini, ið er mannaður við umboðum fyri føroyskan tekniskan, tilbúgvingarligan o.l. serkunnleika hevur havt tríggjar fundir, har fylgjandi evni – ið limirnir í bólkinum í felag valdu – hava verið viðgjørd:

- lóggáva og politikkur, ávirkan á lokala samfelagið
- heilsa, trygd og umhvørvi undir bygging
- fígging av projektinum
- stýring av byggiprocessini (m.a. uppgávan hjá referencubólkurin)
- tilbúgving (herundir royndir frá Vágatunlinum)
- trygd

**- Stýring av verkætlanini**
Í føroyskum høpi hevur hetta verið ein stór verkætlan. Felagið hevur megnað at savna sær førleika at handfara organisatorisku, teknisku, fíggjarligu og trygdarligu avbjóðingina, sum ein slík stór verkætlan er. Tað tykist, sum royndirnar av hesum í ávísan mun eru komnar víðari út í samfelagið gjøgnum samstarvspartarnar, sum felagið hevur havt. Um hetta fer at hava varandi ávirkan á eitt nú projektleiðslu og arbeiðið við heilsu, trygd og umhvørvi á byggiplássunum, má tíðin vísa.

Meðan arbeitt hevur verið, er skipað fyri eftirmeting av arbeiðsgongdini. Nú er arbeiðið er liðugt, verður tikið saman um við einum eftirmetingarfundi, har allir partar, ið hava verið við í verkætlanini, luttaka.

## 4. Rakstrar og íløguætlan fyri komandi árini

| **Rakstur** | **FÆ 2006 mió kr** | **FÆ 2007 mió kr** |
|---|---|---|
| Umsetningur | 18,8 | 30 |
| Rakstur tunnil og vegir | -2,3 | -3,1 |
| Rakstur innkrevjing | -2,3 | -3,1 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar og fíggjarpostar** | 14,1 | 23,8 |
| | | |
| Óvanligir postar | | |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | -8,2 | -16,4 |
| Fíggjarpostar | -6,1 | -10,4 |
| **Ársúrslit** | -0,2 | -3,0 |
| | | |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | 8,2 | 16,4 |
| Avdráttur | -4,4 | -41,6 |
| **Likviditetsbroyting** | 3,6 | -28,2 |
| | | |
| Hækking av partapeningi | | 32,5 |
| **Samlað likviditetsbroyting** | | 4,3 |
| | | |
| **Lyklatøl** | | |
| Akfør (meðal døgn ferðsla) | 1.500 | 1.500 |
| Umsetningur, kr/akfar | 54,35 | 54,79 |
| Rakstur tunnil og vegir, kr/akfar | 6,79 | 5,71 |
| Rakstur innkrevjing, kr/akfar | 6,69 | 5,62 |
| Úrslit áðrenn avskrivingar og fíggjarpostar, kr/akfar | 40,86 | 43,46 |

Fíggjarætlanin fyri 2006 fevnir um tíðina eftir at tunnilin er tikin í brúk, og er eins og fíggjarætlanin fyri 2007 uppsett út frá metingum við støði í Vágatunlinum. Felags gjaldskipanin og framdu umleggingarnar í gjaldskipanini vilja føra til ávísar sparingar í mun til raksturin sum hann var hjá Vágatunlinum og eiga hesar at koma til sín rætt í 2007.

Tórshavn 21. juni 2006

Bergur í Garði, form.

Jens Kári Vilhelm, næstform.

Heri M. Hammer

Bjarni A. Bjarnason

Jóhanna á Bergi

/ Dávid Reinert Hansen